**Fordøming av forboði, ið forðar kvinnum at fáa atgongd til heilsufakligar útbúgvingar í Afghanistan**

Sjúkrarøktaretisku Ráðini í Noregi, Svøríki Grønlandi og Føroyum vilja við hesum fordøma forboðið, ið forðar kvinnum at fáa atgongd til heilsufakligar útbúgvingar í Afghanistan. Hetta forboð er ikki bert eitt álvarsamt brot á grundleggjandi rættindi hjá kvinnum, men hevur eisini víðfevndar avleiðingar fyri heilsu og trivnað í øllum tí afghanska samfelagnum.

Kvinnur í heilsustørvum hava ein týðandi leiklut í heilsuskipanum, serliga í Afghanistan, har mentanarligar normar hava við sær, at kvinnur bert hava møguleika at fáa viðgerð frá øðrum kvinnum. Uttan kvinnulig heilsustarvsfólk verða nógvar kvinnur forðaðar í at fáa grundleggjandi heilsurøkt. Hetta hevur álvarsligar fylgjur við sær, - serliga fyri barnakonur, nýføðingar og børn - eitt nú øktan deyðatíttleika, sum hevði kunnað verið fyribyrgt við atgongd til kvalifiseraða røkt. Harumframt ger forboðið verandi starvsfólkatrot enn verri, tí kvinnur eru ein týðandi partur av heilsugeiranum. Uttan teirra luttøku verður atgongdin til heilsutænastur munandi skerd fyri alt fólki.

Forboðið styrkir eina frammanundan rótsetta kynsbundna ójavnvág og marginaliserar kvinnur enn meira í samfelagnum. Við at forða kvinnum í at útbúgva seg og mennast fakliga, missa tær møguleikan at geva sítt íkast til menning av landinum. Hetta er tekin um ein skipaðan mismun, sum ikki bara undirgravar støðuna hjá kvinnum sum javnbjóðis borgarar, men eisini hóttir heilsustøðuna hjá fólkinum og sosiala javnvágina í landinum.

Undirritaðu Sjúkrarøktaretisku Ráðini heita á altjóða samfelagið um at taka stig ímóti hesi álvarsligu støðu. Vit eru stúrin um og vilja vísa okkara samkenslu við starvsfelagar okkara og kvinnurnar í Afghanistan, sum nú missa møguleikan at útbúgva seg og útinna sítt starv. Hetta er ein álvarslig hóttan móti javnrættindum, virðing og rættvísi – grundsúlunum í etiskari sjúkrarøkt.

Lilas Ali, forkvinna fyri ”sjuksköterskornas etiska råd vid svensk sjuksköterskeförening”

Berit Liland, forkvinna fyri ”Rådet for sykepleieetikk, Norsk sykepleirforbund”

Jana Mortensen, forkvinna ”Sjúkrarøktaretiska Ráðið”

Pauline Olesen, Forkvinna, ”Grønlands sygeplejetiske råd”